Kunngerð
Máls. nr. 23/01194

klaksvíkar kommuna

Byggisamtyktarbroyting millum økispart A18 og B9, Klaksvík

Kærufreist 25.03.2024

Kunngerð

Máls.nr. 23/01194

Byggisamtyktarbroyting millum økispart A18 og B9, Klaksvík

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022, verður við hesum boðað frá, at Klaksvíkar býráð samtykti á fundi 27.10.2023 uppskot um at broyta almennu byggisamtyktina fyri Klaksvíkar kommunu.

Uppskotið til broytingina snýr seg um at víðka A18 (blandað íbúðar- og vinnuendamál). Harvið verður matr.nr. 1009b og partar av matr.nr. 1009a og t, Klaksvík, partar av A18 og ikki longur partar av B9. Broytingin hevur við sær, at B9 (vinnuøki) minkar við uml. 650 m2.

Broytingin umfatar hesar nevndu matr.: 1009a, 1009b og t.





Frá vinstru: galdandi byggisamtykt og broytingaruppskot.

Tilfar, sum lýsir uppskotið um at broyta almennu byggisamtyktina fyri Klaksvíkar kommunu liggur frammi til alment eftirlit í Miðlan í Klaksvík frá 12.02.2024 – 04.03.2024 og er somuleiðis at síggja á heimasíðu kommununnar: www.klaksvik.fo.

Møgulig mótmæli ella broytingaruppskot skulu verða Klaksvíkar kommunu í hendi í seinasta lagi 25.03.2024. Tá ið mótmæli ella broytingaruppskot verða latin, viðmerkið máls.nr. 23/01194.

12.02.2024
Klaksvíkar Býráð